# – Stuttligt at koma í annan handil

**KUNDI – Tað eru sjálvandi nógvir góðir handlar í Klaksvík. Men tað er altíð stuttligt at fara aðrastaðni at vita, hvat tey hava at bjóða, sigur Anna Maria Ragnarsson úr Klaksvík**

Anna Maria og ein onnur dama í familjuni vóru farnar til Fuglafjarðar henda dagin at vitja fólk.

Seinnapartin gekk so leiðin framvið mótahandlinum hjá Kaju.

Hon hevur verið her onkutíð áður, og »dómur« hennara yvir handilin er greiður: – Her er virkiliga nógv lekkurt at fáa.

Eitt annað, sum Anna Maria hevur lagt merki til við kundatænastuni í KATO, er móttøkan:

– Um tað er tí, at ein er fremmandur og tey ikki kenna ein, veit eg ikki. So kanska tey taka øðrvísi ímóti einum. Man følir seg í øllum førum sera væl móttiknan her.

Anna Maria Ragnarsson ætlaði sær henda dagin í farnu viku bert at »hyggja eftir úrvalinum«, sum tað vist eitur.

So fór tíðin bert at vísa, um hon fór aftur til Klaksvíkar við onkrum plaggi úr Fuglafirði.



**ÚRVAL**

*– Tað er altíð spennandi at siggja, hvat úrval teir ymsu handlarnir hava, sigur Anna Maria Ragnarsson úr Klaksvík, sum her er farin til handils í Fuglafirði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




## Ársaðalfundur og alment tiltak

**Ársalfundur og alment tiltak í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum leygardagin 17. apríl kl. 15.00**

Skrá sambært lógum felagsins.

Eftir aðalfundin, uml. kl. 16.00, verður almennur fyrilestur.

»Tað seinasta um fyribyrging og viðgerð fyri demenssjúkur«, er heitið á fyrilestrinum, ið **Gunhild Waldemar** fer at røða um.

Gunhild er professari, dr. med og leiðari á Minnisdeplinum (Hukommelsesklinikken) á Ríkissjúkrahúsinum. Hon fer at greiða frá tí, ið vit vita um minnissvinn (demens) í dag, um nýggjastu granskingina, og um hvussu vit kunnu greina sjúkuna tíðliga, og hvørjir fyribyrgingar- og viðgerðarmøguleikar eru.

Í steðginum millum aðalfundin og fyrilesturin fæst kaffi og køka.

Alzheimerfelagið

www.alzheimer.fo

Sosialurin / KvR 34 18 00



almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

**Umsóknir**

Sendið umsókn við avriti av prógvum, CV o.ø. til:

Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096
110 Tórshavn.

Í seinasta lagi 27. apríl 2010, kl. 12.00.

Vinarliga merkið brævbjálvan: "barsilsstarv".

**Almannastovan søkir eftir BARNSBURÐARAVLOYSARUM fyri tveir SOSIALRÁÐGEVAR frá 1. juli 2010**

**ARBEIÐSMARKNAÐARDEILDIN**

Arbeiðsmarknaðardeildin á Almannastovuni søkir eftir einum ráðgeva sum barnsburðaravloysara. Starvið er fulltíðarstarv frá 1. juli 2010. Møguleiki er fyri niðursettari arbeiðstíð.

**Um deildina**

Arbeiðsmarknaðardeildin hevur til uppgávu at tæna borgarum, sum av sosialum ella heilsuligum orsøkum hava skerdan arbeiðsførleika, og tí mugu hava stuðul fyri at blíva arbeiðsliga og fíggjarliga sjálvbjargin. Á deildini starvast í løtuni 15 starvsfólk, harav 12 eru sosial- og arbeiðsmarknaðarráðgevar. Deildin er landsumfatandi við sæti í Tórshavn.

**Starvið**

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið er í høvuðsheitum:

- geva almenna ráðgeving og vegleiðing um stuðulstiltøk innan almannaøkið
- tilráðing og uppfylging í endurbúgvingarmálum, vardum størvum, arbeiðsroyndum v.m., gera ætlanir fyri at fáa fólk út á arbeiðsmarknaðin, herundir avtalur við arbeiðsgevarar
- viðgerð av fíggjarligum veitingum
- gera tilráðingar viðvíkjandi fyritíðarpensjón.

**ØKISDEILDIN Í HAVN**

Økisdeildin í Havn søkir eftir einum ráðgeva fyri starvsfólk sum fer í barsil í næstum. Talan er um eitt ¾ starv.

**Um deildina**

Uppgávurnar hjá Økisdeildini eru, við grundarlagi í sosiallóggávuni, at veita persónliga sosiala ráðgeving og vegleiðing, og alment og persónligt at upplýsa um rættindi og skyldur og at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og fíggjarligar veitingar. Á deildini arbeiða 13 fólk: deildarleiðari, 8 ráðgevar og 4 málsviðgerar.

**Starvið**

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið er í høvuðsheitum:

- ráð og vegleiðing sambært forsorgarlógini og pensjónslógini, herundir:
- forsorgarhjálp vegna arbeiðsloysi, sjúku v.m.
- stuðul og samskipan av tiltøkum til familjur við børnum, ið bera brek
- persónliga viðbót til pensjonistar
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- móttøka
- til tíðir arbeiði uppá tvørs av deildum og fakmørkum.

Fyri bæði størvini er talan um starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**

Ert tú sosialráðgevi, ella hevur aðra sosiala ella samfelagsiga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt verða við til at hjálpa fólki til eitt virkið arbeiðslív, so er tað tær vit vilja hava fatur á. Royndir í líknandi arbeiði kunnu vera ein fyrimunur.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

Størvini eru flokkað í 6. lønarflokki í sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri upplýsingar**

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til ávíkavist Hall Thomsen, deildarleiðara á Arbeiðsmarknaðardeildini og Marjuna Berg, deildarleiðara á Økisdeildini ella Hildur Eyðunsdóttir, starvsfólkaleiðara á telefon 353510.

KREA · TEL 60 80 80